## Nýggjur sáttmáli við Farmakonomfelagið

SÁTTMÁLASAM-RÁÐINGAR

Fíggjarmálaráðið og Farmakonomfelagið skrivaðu í gjár undir nýggjan 2-ára sáttmála við einum lønarkarmi, sum er 2,6%.

Farmakonomfelagið er danskt felag, og hóast lønarkarmurin er størri niðri, hevur gjørda semjan júst sama karm sum semjan, ið varð gjørd við Føroya Lærarafelag herfyri.

Fíggjarmálaráðið hevur eisini høvuðsavtalu við Farmakonomfelagið, men hon hevur ikki verið til umrøðu, tí hvørgin parturin hevur sagt hana upp.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, fegnast um, at enn ein 2-ára sáttmáli við karmi 2,6% er komin undir land.

Farmakonomarnir fáa í ár 0,9% í lønarhækkan. Herumframt gerst nýggjársaftan heilur frídagur. Landsapotekarin upplýsir, at tessvegna verða apotekini stongd nýggjársaftan, og vakt verður sum sunnudag.

Í oktober næsta ár hækkar eftirlønargjaldið 0,5% og lønin hækkar 1,29%.

Semjan er at finna á heimasíðuni www.lnd.fo, sigur Fíggjarmálaráðið í tíðindaskrivi.

## Lærið at hugsa og skriva sum juristar

**Aftur í vár skipar Søgu- og Samfelagsdeildin á Fróðskaparsetri Føroya fyri undirvísing í grundskeiði í lóg. Skeiðið er fyri fólk, ið hava tikið miðnámsútbúgving ella hava hægri útbúgving í øðrum enn jura**

LØGFRØÐI

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Hetta er fjórðu ferð, at grundskeiðið verður hildið við einum ella fleiri flokkum hvørja ferð, og er tískil vorðin fastur partur av útboðnum hjá Søgu- og samfelagsdeildini. Á henda hátt er deildin við at byggja upp løgfrøði sum fak innan undirvísing og gransking í Føroyum.

Fakið byggir fyrst og fremst á føroyskar keldur, týðandi føroyskar lógir og greinar úr føroyska lógarritinum. Skeiðið byrjar eftir ársskiftið við tímum tvær ferðir um vikuna og endar við próvtøku í juni.

Undirvísingin hevur fyrst og fremst til endamáls at læra fólk háttalagið hjá lógkønum fólki. 'juridiska metodu' og harvið gera tey før fyri at lesa onnur løgfrøðifak og verða betur før fyri at lesa og meta um lógir og aðrar juridiskar tekstir.

Skeiðið fevnir um almennan part við evnunum: at finna lóg, at skipa lóg, at smíða lóg, og at tulka lóg og serligum parti settan saman av brotum úr galdandi stjórnar- og fyrisitingarlógum, serliga stýrisskipanarlógini, heimastýrisskipanini, ríkisgrundlógini, fyrisitingarlógini og lógini um innlit.

Nógv verður gjørt burtur úr at læra at skriva uppgávur, og tey lesandu fáa tvær heimauppgávur, sum verða gjølla gjøgnumgingnar í tímanum. Tann betra uppgávan telur 1/3 av endaliga karakterinum, og skrivlig próvtøka telur 2/3.

Tey lesandi eru vanliga bæði lesandi á Setrinum, ið taka B. A. prógv innan samfelagsfrøði, fólk við aðrari hægri útbúgving enn løgfrøði, og fólk við royndum í fyrisitingini, ið taka skeiðið sum eftirútbúgving. Hesi seinni nevndu mugu gjalda skeiðsgjald fyri at sleppa til undirvísing og próvtøku.

Skeiðið er mett til 15 ECTS, ið svarar til ¼ ársverk, hetta er tí undirvísing á høgum støði í Føroyum og um føroysk viðurskifti. Fróðskaparsetrið fer møguliga undir í samstarvi við onnur universitet at bjóða út onnur løgfrøðifak, sum eftir ætlan skulu verða góðkend sum partur av útbúgvingum í bæði Danmark, Íslandi og aðrastaðni, men tey skulu eisini kunna lesast sum einstøk fak um viðkomandi føroyskar løgfrøðispurningar.

Háskólinn (fróðskaparsetrið) á Akureyri fer í heyst at bjóða út mestaraútbúgving í lóg (M.A./LL.M.) innan høvuðsevnið PólLóg (PolarLaw), ið fevnir um løgfrøðievni, ið knýtt eru at norðurhøvum, t. d. fiskiveiðirættindi, oljulóg og fyrisiting og stjórn í smáum londum. Fyri ikki-juristar kann grundskeiðið í lóg hugsast sum viðkomandi fyrireiking til tílíkar útbúgvingar.

Leiðari fyri grundskeiðið er Birita L. Poulsen, og aðrir undirvísarar eru Jonhard Klettheyggj, Jógvan E. Winther Poulsen, Heðin D. Poulsen og Kári á Rógvi.

# Stovna felag fyri íverksetarar

**Í annaðkvøld verður felag stovnað fyri fólk, sum hava stovnað sína egnu fyritøku. Endamálið er upplýsa og stuðla hvønn annan, sigur Michael Jensen, sum er ein av fyrireikarunum**

VINNULÍV

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Hevur tú júst stovnað tína egnu fyritøku, og hevur tú í hesum sambandi onkur ivamál, tú fegin vildi tosað við onnur um, so fært tú møguleikan. Tí í annaðkvøld, hóskvøldið, verður eitt felag fyri íverksetarar stovna á Hotel Hafnia í Havn.

Tað eru teir báðir, Michael Jensen og Regin Dalsgaard, sum hava tikið stig til at stovnað felagið.

- Endamálið er at stuðla uppundir fólk, sum hava sett sítt egna virki ella fyritøku á stovn. Tað kann snúgva seg um vitan um lóggávu, um menning av virkjum, um leiðslu, um vitan uttanífrá og í heila tikið at styrkja hvønn annan, sigur Michael Jensen, sum fyri stuttum hevur stovnað sína egnu cateringfyritøku.

Michael Jensen og Regin Dalsgaard hava tosað við eini 20 fólk í somu støðu, sum hava víst áhuga fyri felagnum.

Talan er ikki um felag fyri fólk, sum ÆTLA at stovna sína egnu fyritøkuk, men fólk, sum HAVA stovnað hana.

- Eg haldi ikki, at tað var so trupult at stovna mína egnu fyritøku og standa á egnum beinum. Tað var kanska ringt teir fyrstu tveir mánaðirnar, men tá tú hevur fótað tær, so gongur lættari, sigur Michael Jensen, sum kortini sera fegin vil hava samband við onnur fólk, sum eru í somu støðu sum hann.



*Michael Jensen, sum er útbúgvin tænari, hevur fyri stuttum stovnað sína egnu cateringfyritøku. Hann er annar av stigtakarunum til nýggja felagið fyri íverksetarar*

# Sjúklingaráðið sett

**Landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Hans Pauli Strøm, hevur sett sjúklingaráðið**

SJÚKRAHÚSVERKIÐ

Tað er samsvart nýggju sjúkrahúslógini, ið fekk gildi 1. desember í ár, at landsstýrismaðurin hevur valt eitt sjúklingaráð við níggju limum, út frá landafrøðiligum atliti, sum skal hava møguleika at viðgera øll heildarmál um viðurskifti, ið hava týdning fyri veitingar til sjúklingar.

Landsstýrismaðurin hevur valt sjúklingaráðið út frá innsendum uppskotum frá sjúklingafeløgum og áhugabólkum. Tey, ið manna sjúklingaráðið, eru:

Jákup N. Olsen, Tórshavn, uppstillaður av Føroya Felag móti Krabbameini og Epileptikarafelag Føroya.

Malan Johannesen, Tórshavn, uppstillað av Giktafelag Føroya.

Guðri Samuelsen, Tórshavn, uppstillað av Sinnisbata.

Agnar á Dul, Klaksvík, uppstillaður av Landsfelag Pensjónista, Føroya Felag móti Krabbameini og Norðoya Sjúkrakassa.

Steinbjørn í Lambanum, Fuglafjørður, uppstillaður av Epileptikarafelag Føroya.

Jákup Olsen, Klaksvík, uppstillaður av Landsfelag Pensjónista og Norðoya Sjúkrakassa.

Maud Benjardøgg, Vágur, uppstillað av Epileptikarafelag Føroya og Føroya Felag móti Krabbameini.

Sóleyð Nielsen, Hvalba, uppstillað av Javna.

Finnleif Guttesen, Tvøroyri, uppstillaður av Hjartafelagnum

Samsvart lógini er uppgávan hjá sjúklingaráðnum at verða ráðgevandi hjá landsstýrismanninum í málum, ið hava týdning fyri veitingar til sjúklingar. Ætlanin er, at ráðið skal geva landsstýrismanninum eitt breiðari avgerðargrundarlag, við at ráðgevinigin kann vera øðrvísi enn tann, hann fær frá fakpersónum í heilsuverkinum.

# Nýggj nevnd í FNU

**Á eykaaðalfundi hjá Føroya Náttúruverndarfelag á Føroya Læraraskúla 28. november, legði nevndin frá sær, og nýggj nevnd varð vald**

NÁTTÚRUVERND

Nýggja nevndin í Føroya Náttúruverndarfelag skipaði seg 3. desember og sær soleiðis út:

Kári Thomsen, Tórshavn, formaður
Anna Antonisen, Nólsoy, næstformaður
Eliesar Olsen, Tórshavn, skrivari
Zakarias Wang, kassameistari
Leivur Nattestad, Miðvágur, nevndarlimur

Tiltakslimir eru Justi Poulsen, Jón Gaasedal, og Òli Mikkelsen.

Nevndin hevur sett sær fyri at halda á fram við tí arbeiði, felagið hevur staðið fyri síðan stovnanina í 1980. Nakrar stórar uppgávur skulu fremjast í 2006, og fleiri smærri tiltøk skulu fáast at virka líkasum uppfylging av lands- og kommunuætlanum og lógum og kunngerðum, ið fevna um náttúru- og umhvørvisvernd á landi, sjógvi og í luftini.

- Árligi fundurin hjá norðurlendsku náttúruverndarfeløgunum verður í 2006 skipaður av Føroya Náttúruverndarfelag og hildin í Suðuroy í fyrstu viku í august.

- Fyrireiking og miðvís ætlan til skipan av tjóðgørðum verður løgd fram til heystar.

- Fyrireiking og ætlan til skipan av friðaðum økjum her m. a. vøtnum og serstøkum náttúruøkjum.

- Felagið hevur lim í fylgibólkinum til skipan av nýggjari el-veitingarlóg, og vil her so vítt gjørligt tryggja móti framhaldandi ágangi á vøtn, áir, dalar og serstaka náttúru.

- Landsmyndugleikar fara at verða mintir á norðurlendskar og altjóða sáttmálar til vernd av náttúruni, og roynt verður at fáa samstarv við almennar stovnar, kommunur, virki, feløg og einstaklingar.

- Roynt verður at skipa fyrilestrar fyri ungum og skúlaungdómi um náttúrunnar lutverk í burðadyggari samfelagsmenning.

- Nevndin fer at viðgera øll mál, ið einstaklingar ella feløg meta Føroya Náttúruverndarfelag kann stuðla ella lýsa teirra vegna.

- Nevndin fer at hava vakið eyga við handilsvørum, ið partvís eru eitrandi fyri fólk og náttúru, og partvís óneyðug í vanliga húsarhaldinum.



*Kári Thomsen er framvegis formaður í Føroya Náttúruverndarfelag, sum hevði aðalfund 28. november*